## Holst tapti

Christian Lamhauge Holst og liðfelagarnir spældu í gjár fyrsta venjingardystin sum liður í fyrireikingunum til komandi kappingarár. Silkeborg tapti 2-0 á heimavølli móti Esbjerg. Christian Lamhauge Holst byrjaði sum framherji, og var skiftur út, tá ein tími var leiktur av dystinum. Føroyski landsliðsframherjin gjørdi ikki stórvegis um seg, tá hann var á vøllinum.



## Seedorf vísur Ajax aftur

Clarence Seedorf skifti í 1995 frá Ajax. Síðan hevur hann gjørt seg galdandi í fleiri evropeiskum stórfeløgum, har hann seinastu sjey árini hevur umboðað AC Milan. Tað ger hann eftir øllum at døma eisini í komandi kappingarári, hóast Martin Jol, venjari hjá Ajax, hevur sýnt honum áhuga. – Seeford hevur nógvar royndir. Hann hevði hjálpt nógv hjá okkara unga liðið. Men hann gjørdi mær greitt, at hann ikki vendir heim á hesum sinni, sigur Martin Jol við Voetball International.

# í gulli





Pál Joensen er stórfavorittur í 400 metra frí. Vinnur hann her, hevur hann á 50 metrinum møguleika at rudda borðið fullkomuliga við gulli á øllum teinum í frísvimjing

Mynd: Álvur Haraldsen

# Pál kann rudda borðið



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

**Í dag er seinasti dagurin, at kappast verður í svimjihøllini, og aftur hesa ferð eru sera góð útlit fyri føroysku heiðursmerkjunum**

Pál Joensen skal svimja 400 frí, har hann til nú hevur vunnið 100, 200 og 1500. Shaila millum Garðarnar liggur til gull í 100 frí, og ungu genturnar Birita Debes og Poula Ø. Mohr liggja til ávíkavist gull og silvur í 50 frí. Pál Joensen og Pauli Ø. Mohr svimja 50 frí, har Pauli hevur møguleikan at vinna sítt fyrsta gullmerki sum einstaklingur, og har Pál helst hevur møguleikan at rudda borðið í øllum frísvimjingarteinunum.

Luttøkan hjá føroyingum í dag: (í klombrum er viðmerkt styrkismetingin sambært tilmeldingartíðunum)

100 blandað kvinnur: Poula Ø. Mohr (5)
400 frí menn: Pál Joensen (1) og Andrass Thomsen (3)
200 firvald kvinnur: Eingin føroysk luttøka
100 rygg menn: Kári J. á Høvdanum (2)
100 frí kvinnur: Shaila millum Garðarnar (1) og Guðrun H. Jacobsen (11)
50 frí menn: Pauli Ø. Mohr (2) og Pál Joensen (3)
50 rygg kvinnur: Birita Debes (1) og Poula Ø. Mohr (2)
200 bringa menn: Pál Joensen (2)
4x100 blandað kvinnur: SSF (eingin tilmeldingartíð)
4x100 frí menn: SSF (eingin tilmeldingartíð)
8x50 frí mix: SSF (eingin tilmeldingartíð)

## FAKTA

### Finaluluttøkur mikudagin:

**100 blandað menn:** Pál Joensen 57.66 (2) - føroyskt met

**400 frí kvinnur:** Mona Simonsen 4:19.54 (1) - føroyskt met og oyggjaleikamet

**200 rygg menn:** Kári J. á Høvdanum 2:08.08 (4)

**100 bringa kvinnur:** Malan V. Bærendsen 1:13.13 (1) - føroyskt met

**100 bringa kvinnur:** Katarina S. Lamhauge 1:15.23 (3)

**100 frí menn:** Pál Joensen 50.04 (1) - føroyskt met og Oyggjaleikamet

**100 frí menn:** Pauli Ø. Mohr 52.94 (6)

**50 frí kvinnur:** Shaila millum Garðarnar 26.63 (1) - Oyggjaleikamet

**50 frí kvinnur:** Guðrun H. Jacobsen 27.27 (4)

**50 firvald menn:** Pál Joensen 25.62 (1) - føroyskt met

**50 firvald menn:** Kári J. á Høvdanum 25.86 (3)

**200 rygg kvinnur:** Bjørg Seloy 2:21.59 (3)

**200 rygg kvinnur:** Birita Debes 2:26.27 (7)

**4x100 blandað menn:** SSF (Kári á Høvdanum, Pál Joensen, Andrass Thomsen, Pauli Øssurson Mohr) 3:49.68 (2) - landsliðsmet

**4x100 frí kvinnur:** SSF (Poula Øssursdóttir Mohr, Guðrun Holm Jacobsen, Mona Simonsen, Shaila millum Garðarnar) - kolldømd vegna tjóvstart